# stórum parti av fiskiflotanum




*Tað var Bjarni Poulsen, sum vegna Grannskoðarafelagið Rasmussen & Weihe, hevði framløguna á áhugaverda fundinum týsdagin*

Mynd: Jens Kr. Vang

– Heldur núverandi gongdin fram, fer at tátta í hjá partrolaraflotanum.

## Lemmatrolarar

Samanumtikið er fíggjarliga støðan hjá hesum partinum av flotanum hampiliga góð, og somuleiðis er konsolideringin góð. Hinvegin er gjaldførið ikki serliga gott.

– Lemmatrolararnir høvdu ikki nakað serliga gott ár í 2003, og ábendingar eru um, at árið 2004 ikki royndist betur.

Felagið vísir til Hagtíðindi, sum veit at siga, at lemmatrolararnir hava havt eina lítla framgongd í veiðivirði fyrstu átta mánaðirnar í ár uppá 2%.

– Hinvegin er oljan vorðin munandi dýrari í 2004. Tí má roknast við, at hesin skipabólkur samanlagt eisini kemur at merkja eina afturgongd í 2004.

Tað er serliga tann eini lemmatrolarin, sum hevði eitt gott úrslit í 2003, og hetta ger stóran mun fyri samanlagda skipabólkin.

## Línuskip

Línuskipaflotin hevur havt nøkur góð ár og er væl fyri.

– Hesin skipabólkur hevði eitt serstakliga gott ár í 2003, men roknað verður við, at árið 2004 helst verður nakað lakari.

Hagtíðindi vita at siga, at línuskipini hava havt eina afturgongd í veiðivirði fyrstu átta mánaðirnar í 2004 uppá 13% í mun til somu mánaðir árið fyri.

Agnið, sum línubátarnir egna, er nógv dýrari í ár enn undanfarin ár. Tað er serliga høgguslokkurin, sum er dýrkaður, og makrelurin er eisini øktur nakað í prísi.

– Saman við minkandi veiðivirðinum, dýrari olju og agni er væntandi, at úrslitið hjá línuskipunum verður lakari í 2004 enn í 2003, sigur grannskoðarafelagið.

## Garnaskip

Garnaskipini hava havt nøkur góð ár, men árini 2002 og 2003 royndust minni væl hjá hesum partinum av flotanum. Tó eru hesi skip enn væl fyri.

– Tað eru tó ábendingar um, at afturgongdin, sum verið hevur, er vend til eina framgongd í 2004.

Rasmussen & Weihe byggja metingina fyri árið 2004 á Hagtíðindi, sum veit at siga, at "gørn og annað" hava havt eina framgongd í veiðivirði fyrstu átta mánaðirnar í ár uppá 13% í mun til somu mánaðir í 2003.

– Garnaskipini hava skilagott gjaldføri, og tey eru rímiliga væl konsolideraði, hóast raksturin ikki hevur gingið so væl í 2002 og 2003, sigur Grannskoðarafelagið.

## Onnur skip

Í bólkinum "onnur skip", har eitt nú Næraberg og West Freeser eru, gongur minni væl, og útlitini fyri árið 2004 er ivingarsom.

Hesin bólkur er soleiðis samansettur, at miðaltølini fyri bólkin siga lítið og einki um gongdina hjá teimum fýra skipunum, sum eru í hesum bólki. Hesi skip eru so ymisk, bæði í støðd og veiði.

framhaldandi fer at minka.

Rækjuflotin hevur stórt hall, og feløgini eru í gjaldføristrupulleikum.

– Støðan hjá rækjuflotanum er sum heild álvarslig.

## Verksmiðjutrolarar

Grannskoðarafelagið sigur, at verksmiðjutrolarar hava havt rímiliga góð ár, og flotin var væl fyri við árslok 2003, tó at tað hetta árið fór at ganga afturá.

– Tær ábendingar, sum vit hava fingið, siga, at raksturin av hesum skipabólki í 2004 er nøkulunda á sama støði sum í 2003.

Tonsatalið hjá verksmiðjutrolarunum er økt, men miðalprísurin er minkaður. Nøkur skip hava góð úrslit í 2003. Hjá øðrum gekk verri, men tey tera uppá tøka peningin, sum feløgini hava.

## Partrolarar

Partrolaraflotin er hampiliga væl fyri, men fíggjarstøðan versnaði munandi árini 2002 og 2003.

– Tær ábendingar, sum vit hava fingið fyri árið 2004, eru ikki serliga positivar.

Grannskoðarafelagið vísir á, at sambært Hagtíðindum hevur partrolaraflotin havt eina afturgongd í veiðivirði upp á 16% fyrstu átta mánaðirnar í 2004 í mun til somu mánaðir í 2003.

– Hetta er ein sera stór afturgongd, heldur felagið.

Oljan er vorðin dýrari, fiskurin smáur, og fiskaprísirnir eru lágir.

Grannskoðarafelagið sigur, at árið 2001 var eitt so gott ár hjá hesum parti av flotanum, at reiðaríini kundu havt innfríað langfreistaðu skuldina hetta árið.



*Roknskapargreiningin hjá Rasmussen & Weihe byggir í fyrsta lagi á almennar roknskapir hjá feløgunum, sum eiga skipini*

Mynd: Jens Kr. Vang